## Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Havnar Svimjifelag varð hildin **mikukvøldið 29. apríl 2015 kl. 19.00** í kantinuni í Svimjihøllini í Gundadali. Skrá sambært viðtøkunum var:

1. Val av fundarstjóra
2. Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøða til góðkenningar
4. Ásetan av limagjaldi fyri komandi ár
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Innkomin mál
8. Ymiskt

Atkvøðurætt hava limir, ið eru fyltir 14 ár, og foreldur ella verji hjá teimum limum, sum ikki eru fyltir 14 ár. Foreldur ella verji hava eina atkvøðu fyri hvørt barnið, sum er limur. "HS - stuðlar" hava atgongd til aðalfundin, men hava bert atkvøðurætt, um teir eru limir.
***Fyri nevndina møttu:*** Erling Eidesgaard, formaður og Leivur Michelsen, kassameistari. Harafturat møttu 14 aðrir luttakarar.

**1. Val av fundarstjóra**

Jon Hestoy varð í uppskoti sum fundarstjóri, og varð einmalt samtykt at velja hann.

**2. Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári.**

***Formaður greiddi frá, hvat er hent í felagnum, síðan seinasta aðalfund:***

Aftaná at royndartíðin var yvirstaðin, varð sáttmálin við høvuðsvenjaran staðfestur og er galdandi fram til endan á sesongini 2015/16 - við møguleika fyri at leingja.
Jarmundur gavst í desember 2014. Hann bleiv avloystur av Jóannesi á Fløtti, ið nú hevur 3. lið og Aimi Helbo, ið hevur 4. lið.

Kappingarliðini hava verið á tveimum venjingarlegum. Fyrst í Esbjerg (Denmark) 9.-16. Mars 2015 with 5 swimmers (who had been pre-selected by SSF for Island Games). Seinna venjingarlegan var í Lisbon (Portugal) 1.-8. Apríl 2015 við øllum á 1. og 2. liði.

Óli luttók á heimsmeistarastevnu (SC) í Doha, Qatar, fyri SSF dagarnar 03-07.12.2014 og á veg heim aftur luttók hann á Amsterdam Swim Cup í Hollandi. Rui var við sum venjari. Úrslitini vóru góð. Ma. svam Óli á fyrsta sinni omanfyri 800 Fina stig.

NJM – NORDIC JUNIOR CHAMPIONSHIPS, STOCKHOLM, SWEDEN (SHORT COURSE) BY SSF 12-14.12.2014
4 av okkara vóru úttikin av SSF. Marius Gardshodn, Niels Nattestad, Lív Eidesgaard, Maria Antoft.
Vit komu í nakrar finalur og tóku onkur føroysk junior met.

RIG – REYKJAVIK INTERNATIONAL GAMES, ICELAND (LONG COURSE) BY HS 16-18.01.2015
Óli luttók fyri at fáa langbana kappingarvenjing. Vann onkra kapping og sett fø. met.

DANISH OPEN 2015, COPENHAGEN (LONG COURSE) BY HS
28-31.03.2015

Óli Mortensen, Astrid Foldarskard, Beinta Debes, Lena Rannváardóttir, Lív Eidesgaard, Maria Antoft og Vár Eidesagaard luttóku. Úrslitini vóru á einari leið, tá tikið verður í betragtning, at tey komu beint úr 25m. Onkur juniormet.

**FYRI FRAMMAN:**
MARE NOSTRUM 2015, Canet, 6-7 June, and Barcelona, 10-11 June.
2 Swimmers from HS were selected by SSF (Óli Mortensen and Astrid Foldarskard).

EUROPEAN GAMES, Baku, 23-27 June 2015
3 Swimmers from HS were selected by SSF (Marius Gardshodn, Lív Eidesgaard and Maria Antoft).

Oyggjaleikir, Jersey, 29 June – 2 July 2015
7 Swimmers (av 15) from HS were selected by SSF (Bartal Hestoy, Óli Mortensen, Marius Gardshodn, Astrid Foldarskard, Vár Eidesgaard, Lív Eidesgaard and Maria Antoft).

Venjingarlega í Barcelona fyri 1. og 2. lið í heystferiuni 2015.

**3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøða til góðkenningar**
Roknskapurin vísti eitt lítið avlop uppá 13,7 tkr.
Aðalfundurin góðkendi roknskapin.

**4. Ásetan av limagjaldi fyri komandi ár**
Aðalfundurin samtykti, at limagjaldið verður óbroytt.

**5. Val av nevndarlimum**
Fyri valið vóru Leivur Michelsen, Eirikur Hofgaard og Rannvá Rasmussen. Leivur Michelsen og Eirikur Hofgaard ynsktu at taka við afturvali, umframt at trý nýggj vóru skotin upp: Rúna í Skála, Tummas Ryggshamar og Finnbjørg Nattestaad. Sambært lógum felagsins kunnu 5-7 nevndarlimir vera, og vóru sostatt øll hesi vald.

**6. Val av grannskoðara**
Marjun Eystberg hevur verið grannskoðari fyri 2014 og varð hon einmælt afturvald fyri 2015.

**7. Innkomin mál**
Einki mál var innkomið

**8. Ymiskt**
Finnbjørg skeyt upp, at Havnar Svimjifelag ger okkurt fyri teir svimjarar á 1. og 2. liði, sum ikki skulu til kappingar uttanlands í summar. Evt. saman við hinum feløgunum í landinum. Hetta var tað undirtøka fyri
Kl 19.35 takkaði fundarstjórin fyri góðan fundarsið og lýsti aðalfundin at vera av.

6/5-15

______________________________
Jon Hestoy, fundarstjóri